# dreymurin





*Ígjøgnum sínar framúr góðu talugávur hevur Barrack Obama veruliga brent seg inn í amerikonsku hjørtini*

um, sýnist tað mær, sum um at amerikumenn eru sum børn, ið eru sloppin leys út í umstøður, har tað, orsakað av strukturellum frágreiðingum, er teimum ómøguligt at klára seg - tey eru fræls, men umstøðurnar loyva teimum ikki at njóta frælsið. Tað er tá, at staturin, sum eitt neyðturviligt „evil“ eigur at traðka til, og geva tí einstaka betri kor, so at hann kann liva tann amerikanska dreymin og njóta frælsið, og vónandi er tað hetta, Obama fer at megna at útinna sum nýggjur amerikanskur forseti.

### Amerikanski staturin skal vera meira menniskjansligur

Tí kann USA sum eitt kristið land tola tað, at tess íbúgvar líða so nógv, sum teir nú einaferð gera ? Um svarið er ja, so lovyi eg mær at ivast í, hvussu kristið USA nú einaferð er. Og tað syrgiliga er, at eg loyvi mær at ivast í, hvussu kristið USA er. USA er eitt land, sum er eyðkent av morali, og av alt skal vera so og so strangt, og alt skal vera lóg og ordan, men tá tað kemur til at hjálpa og til at bøta um umstøður hjá fólki, so hava myndugleikarnir brádliga ongan áhuga í at hjálpa. Eitt einfalt dømi um hetta er ein fátækur maður, ið gekk á einari metro-støð í Los Angeles uttan metro-ferðaseðil, og tað er sum kunnigt forboðið at vera á nakrari metro-støð uttan ferðaseðil. Politiið sá mannin, spurdi hann um ferðaseðilin og róku hann so av metro-støðini, tá ið tað varð teimum greitt, at maðurin ongan ferðaseðil hevði. Hatta er USA, tá tað er ringast. Tú hevur nakrar strangar lógir at fylgja eftir, sum staturin hevur sett, og so leggur man ikki í tínar umstøðir, so leingi tú fylgir lógunum. Amerikanski staturin hevur ongar trupulleikar í at fremja lógir, ið eru við til at gera alt strangari, men staturin hevur ógvusligar trupulleikar, tá tað kemur til at hjálpa sínum íbúgvum úr truplum umstøðum, og tá kemur til at vísa menniskjansligar kenslur og samkenslu sum heild.

### Proposition 8 - Samkynd í Kaliforniasleppa ikki longur at gifta seg

Og so er tað tann kristni høgravongurin í USA. Tað var júst hesin, sum legði uppskot fram, Proposition 8, um at fremja eina grundlógarbroyting í grundlógini fyri Kalifornia, so at tað ikki longur skuldi vera møguligt hjá samkyndum at gifta seg. Uppskotið varð samtykt týsdagin, sama dagin sum forsetavalið stóð á skránni, við 54% fyri og 46% ímóti. Hetta uppskotið, sum varð lagt til fólkaatkvøðu her í Kalifornia, hevur vakt stóran ans millum manna og hevur her í San Diego havt kanska ein størri áhuga millum manna, enn hvat sjálvt forsetavalið hevur havt. Tað er soleiðis, at San Diego er ein ógvuliga liberalur býur, og tað er ein rúgva av samkyndum her í San Diego, og serliga í býarpartinum, har eg sjálvur búgvi, og tí hevur man sæð nógv av val-reking fara fram, serliga til frama fyri tey, sum ikki vildu hava uppskotið samtykt. Uppskotið varð tó samtykt til stórt vónbrot fyri øll tey samkyndu í býarpartinum, har eg búgvi, og nú er tað so ikki longur møguligt hjá samkyndum í Kalifornia at gifta seg. Hetta minnir meg á stríðið um víðkanina av Grein 266b, sum var fyri tveimum árum síðan. Tá víðkanin av 266b var ein veruleiki eftir atkvøðugreiðslu í løgtinginum varð tosað um í tí kristnu leguni, at víðkanin av 266b var fyrsta stigið av eini glíðibreyt, sum Føroyar nú vóru á veg ígjøgnum, sum fór at vera til frama fyri rættindini hjá teimum samkyndu. Nú síggja vit altso tað umvenda henda í USA. Tey samkyndu missa rættindini, tey annars hava havt, og við hesum skuldu Miðflokkafólk nú havt orsøk til at smílast, tí endiliga hendir nakað jaligt í hesi óndu verð. USA hevur við hesi grundlógarbroyting aftur vent sær til Gud. Hetta síðsta sigi eg við einum ironiskum undirtóna !!

Eg má spyrja meg sjálvan, um tað veruliga eigur at vera tann fyrsta raðfestingin hjá okkum at leggja allan okkara dent á taka rættindi frá fólki, og í hesum føri er tað so talan um rættindini hjá teimum samkyndu í Kalifornia at gifta seg. Fyri tað fyrsta so haldi eg ikki, at tað er í lagi, tá samkynd gifta seg, tí eg meti hjúnabandið vera millum mann og kvinnu, men hinvegin so meti eg heldur ikki, at tað er í lagi, tá fólk taka rúsevni, men hetta merkir ikki, at eg eri ímóti fríari rúsevnissølu. So eg haldi ikki, at tað er í lagi, tá samkynd gifta seg, men hetta merkir ikki, at eg neyðturviliga eri ímóti tí, og so slett ikki, tá tey samkyndu í Kalifornia longu høvdu hesi rættindini, rættindi sum tey ikki hava longur. Eg haldi sum so, at so nógv sum gjørligt skal vera loyvt, tí eg trúgvi ikki uppá forboð. Forboð forða ikki tingum í at henda, m.a. er tað ikki loyvt at nýta rúsevnu, men fólk fáa hendur á rúsevni allíkavæl, og man kann spyrja seg sjálvan, um tað ger ein stat so øgiliga nógv „kristnari“, tá hann hevur øll møgulig forboð. USA hevur nógv forboð av ymsum slag, men hvussu ber USA seg at móti øllum teimum mongu veiku í samfelagnum? Jú, amerikanskir staturin vil ikki hjálpa teimum. Ístaðin nýtir USA stóra orku uppá at raðfesta eitt nú Afghanistan, og hetta er nakað, sum Obama eisini ætlar sær at gera framyvir. Og USA nýtir eina øgiliga orku innan politi-verkið fyri at basa narko-heiminum. Hetta eru alt raðfestingar, sum hava við sær, at tey veiku ikki verða raðfest líka høgt, sum tey nú einaferð áttu at verið raðfest. Og tá summir amerikumenn royna at spæla kristnir við at tosa ímóti rættindum hjá m.a. samkyndum og við at tosa ímóti fríari fosturtøku, so er tað bara so ræðuliga dupultmoralskt og minnir meg á ein hátt um fariseararnar í Nýggja Testamenti. Eg eri als ikki nakar samkynd-fjeppari ella nakar fría-fosturtøku-fjeppari, men eg haldi, at fólk skulu fyrst og fremst hugsa um, hvussu næstin hevur tað. USA hevur ov nógv av fólki, ið geva sær stundir til at tosa um, hvussu skeivt tað er at vera samkyndur, meðan USA á hinari síðuni hevur ov lítið av fólki, og serliga innan statsverkið, ið gevur sær stundir at leggja í, hvussu nógvan pening fólk vanta í fyri at kunna gjalda teirra sjúkrahúsrokning. Eitt land sum Føroyar hevur ráð til at tosa um rættindi hjá samkyndum og líknandi, tí Føroyar eru somikið væl fyri. Øll hava tað sum so gott í Føroyum, í hvussu er í mun til USA, men í USA eigur man fyrst og fremst frá politiskari síðu at leggja dent á, at teir grundleggjandi tørvirnir hjá tí einstaka verða nøktaðir. Tá hesir tørvir hjá tí einstaka eru nøktaðir, so kann man fara at skeldast um, t. d. Propositon 8 skal verða samtykt ella ikki. Bíblian tosar nógv um, hvat er rætt, og hvat er skeivt, men tað, sum Jesus fyrst og fremst legði dent á, var, at teir grundleggjandi tørvirnir hjá fólki vórðu nøktaðir. Vónandi kann Obama gera tað sama sum Jesus, nakað sum eg vænti, at hann ikki megnar, men latið okkum nú vóna tað besta og geva manninum ein møguleika.

### Niðurstøða

So Obama slapp fram at og hevur nú møguleikan til at broyta amerikanska samfelagið. Fólk eru sum heild glað fyri, at Obama vann valið, tí tað eru nógv her, sum ikki hava tað gott, og í Obama síggja nógv ein mann, sum kann bøta um teirra umstøður. Eg skilji ikki, hví tey gera tað, men so hava tey í hvussu so er eina vón her í lívinum, og tað er so altíð nakað. Vónandi kann Obama broyta amerikanskan politikk. Eg haldi, at tá man endiliga skal hava ein stat, so kann man akkurát tað sama nýta hann til frama fyri tann vanliga borgaran heldur enn at hava hermegi í eitt nú Vesturevropa, og eg haldi, at staturin eigur at geva fólki so nógv frælsi og rættindi til tann einstaka sum gjørligt. Staturin skal tæna fólkinum. Staturin skal ikki vera tann, sum setur óneyðug forboð.

So nú er amerikanska valið av á hesum sinni, og føroyskur fjølmiðlarnar fara nú at venda nøsini heimeftir til kommunuvalið, sum verður á skránni. Men tíðin, ja, hon rennur sum streymur í á, og um fýra ár, so er aftur amerikanskt forsetaval á skránni, og tá skal tann republikanski flokkurin royna at endurvinna tey Hvítu Húsini frá Barack Obama og demokratunum. Møguliga burdu republikanararnir roynt at gjørt hetta við leiðslu av einum manni, sum ber navnið Ron Paul....